## Heimsmeistaraheitið í egning

**20. august í ár, fer Norðlýsið, saman við øðrum at fyrireika fyrsta heimsmeistaraheitið í egning nakrantíð**

EGNING
*tíðindaskriv*

Tað hevur verið tosað nógv og leingið aftur og fram í Klaksvík um at skipa fyri einum heimsmeistaraheiti í egning. Nú hevur so Norðlýsið, saman við øðrum tikið stig til at skipa fyri eini slíkari kapping, og dagurin er setur at vera 20. august í ár.

Ætlanin er, at eitt stórt tiltak við fjølbroyttari skrá skal leggjast fyri leygardagin 20. august, har alskyns undirhald við tilknýtið til sjógv og fiskarí skal fyriskipast.

Enn er skráin fyri dagin ikki løgd, men arbeitt verður við hesum og um nakrar dagar verður ein skrá kunngjørd og eisini ein reglugerð fyri heimsmeistaraheitið í egning.

## Suðuroyar Kommuna eigur at yvirtaka raksturin av Smyrli

– Um kommunurnar í Suðuroynni løgdu saman til eina kommunu, átti ein at flutt raksturin at Smyrli til Suðuroynna, sigur tingmaðurin, Ingi Olsen úr fólkaflokkinum.

Fríggjadagin hevði tingið 1. viðgerð av einum uppskoti um at byggja ein umsitingarbygning á Krambatanga í Trongisvágsfirði.

Fleiri tingmenn høvdu orðið, – teirra millum Ingi Olsen úr Vestmanna, sum er á tingi sum varamaður fyri fólkaflokkin í Norðstreymoy.

Undir viðgerðini nært hann við spurningin um samanleggingar av kommunum, og mælti tí staðiliga til, at øll Suðuroyggin verður løgd saman í eina kommunu.

– Eftir at hetta varð gjørt kundi landið flutt eina árliga upphædd til raksturin av hesi samanløgdu kommununi, til suðringar sjálvar at umsita, segði Ingi Olsen m.a. undir viðgerðini.

Mett verður, at árligi kostnaðurin av at reka Smyril kemur at ligga um 25-30 mió. kr. Tá eru avskrivingar ikki við.

Henda upphædd kundi verið flutt til kommununa í Suðuroynni, sum sjálv kundi staðið fyri rakstrinum og tilrættaleggingini av suðuroyarsiglingini.

### Ikki til fyrimuns

Í uppskotinum til umsitingarbygningin skjýtur tingmaðurin, Hergeir Nielsen, upp at flyta alla umsitingina av strandfaraskipunum til Suðuroyar.

Men hesum tók Ingi Olsen ikki undir við.

– Hetta vildi óivað verið til fyrimuns fyri suðringar, helt hann fyri. Men tað hevði ikki verið til fyrimuns fyri restina av landinum.

Málið varð til 1. viðgerð í tinginum fríggjadagin og er nú beint til víðari viðgerð í vinnunevndini.

Ingi Olsen hevur sætið á Løgtingi í løtuni, meðan Heðin Zachariasen er í farloyvi í 10 dagar. Heðin Zachariasen er limur í vinnunevndini og tí framsøgumaður Fólkafloksins í vinnumálum.

**sb.**

# Enn er neyðugt at býta Suðuroy í tvey



*– Kasta vit alla Suðuroynna saman í eina eind nú, er vandi fyri, at tann sterkari fer at eta tann minni sterka, tí syðra helvt er so nógv verri fyri enn norðara helvt er, sigur Rói Hjelm, formaður í vinnuráðnum í Suðuroyar syðru helvt*

**– Eg taki undir við at Suðuroy skal vera ein eind, men fyrst má syðra helvt fáast á føtur aftur, sigur Rói Hjelm formaður í vinnuráðnum í Suðuroyar syðru helvt**

SAMANLEGGING Í SUÐUROY
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

–Tankin um at Suðuroyggin skal vera ein eind og draga eina línu, er góður.

– Men tað kann ikki vera, sum støðan er nú.

Tað heldur Rói Hjelm, formaður í vinnuráðnum í Suðuroyar syðru helvt.

Ferð eftir ferð seinastu tíðina hava vit hoyrt, at tað einasta rætta er, at øll Suðuroyggin verður løgd saman í eina kommunu.

Samstundis verður eisini mælt til, at vit fáa eitt vinnuráð fyri alla Suðuroynna, ístaðin fyri at halda fram sum nú, har vit hava eitt vinnuráð fyri Suðuroyar syðru helvt.

Formaðurin í vinnuráðnum í Suðuroyar syðru helvt skilir væl tankan, men hann er ikki samdur.

– Sum støðan er nú, haldi eg ikki, at tað er rætt at gera eitt vinnuráð fyri alla Suðuroynna.

Hann sigur, at í løtuni er sera stórur munur á vinnuligu støðuni í syðru- og norðaru helvt í Suðuroy, har syðra helvt er nógv verri fyri enn norðara helvt.

– Tí er tað eisini neyðugt at trupulleikarnir í Suðuroy verða viðgjørdir í tveimum og at trupulleikarnir í Suðuroyar syðru helvt sostatt verða viðgjørdir fyri seg.

Hann nevnir sum eitt dømi, at eginpeningurin hjá partafeløgum í norðaru helvt, er tríggjar ferðir so stórur sum eginpeningurin hjá virkjunum í syðru helvt.

– Sostatt er greitt hvussu langt afturúrsigld syðra helvt er og tí haldi avgjørt eisini, at trupulleikarnir í hesum partinum í oynni mugu viðgerast fyri seg.

– Tí heldur hann eisini at tað er rætt at varðveita vinnuráðið fyri Suðuroyar syðru helvt.

– Gera vit eitt vinnuráð fyri alla oynna sum støðan er nú, stúri eg fyri, at norðara helvt fer at fáa ov stóra ávirkan.

– Ella sagt við øðrum orðum, so er vandi fyri, at teir sterkari fara at eta teir veikaru og at hetta fer at føra við sær, at syðra helvt fer at vera enn meiri afturúrsigld.

– Eg haldi, at vit kunnu tosa um at kasta saman so leingi tað er so stórur ójavni ímillum báðar helvtirnar í oynni. Suðuroyar syðru helvt má fyrst fáast á føtur aftur, áðrenn talan kann vera um at kasta saman. Tað má vera ein javnvág í fyri at onnur helvtin ikki skal taka ræði á hinari helvtini.

### Tann sterkari verður enn sterkari

Rói Hjelm sigur, at hann hevur somu atfinning at Suðuroyarætlanini hjá landsstýrinum.

– Í norðaru helvt hava tey als ikki somu trupulleikar, sum í syðru helvt- og nú eisini í Hvalba. Sostatt kann henda, at ein ætlan fyri alla oynna fer at raka har, sum ongir trupulleikar eru og teir fara sostatt at gera tann sterkara partin í oynni enn sterkari afturímóti í veikara partinum.

Rói Hjelm heldur tvørturímóti, at norðara helvt í Suðuroy átti eisini at havt sítt egna vinnuráð.

Men bæði vinnuráðini áttu so at sett ein ráðgevara, sum kundi samskipa arbeiðið hjá báðum vinnuráðunum og loyst uppgávur fyri bæði vinnuráðini.

Eru tit so eisini ímóti at øll oyggin verður løgd í eina kommunu?

– Í vinnuráðnum í Suðuroyar syðru helvt, leggja vit okkum ikki út í politikk.

Í hesum sambandi vil Rói Hjelm sostatt ikki siga nakað fyri alt vinnuráðið.

Men sjálvur dugir hann ikki at síggja, hvørja ávirkan ein komm-unusamanlegging fær á vinnuligu støðuna.

Hinvegin heldur hann heilt avgjørt, at kommunurnar í Suðuroy eiga at samstarva meiri.

– Eg haldi, at vegurin fram at fyrst at fáa meiri samstarv ílag ímillum kommunurnar, og so kann spurningurin um samanlegging koma mest sum natúrliga.

– Men tað vísir seg tíverri, at tá ið kommunurnar skulu samstarva um ymiskt, fæst onki samstarv ílag.

Hann vísir á, at onkur hevur so rámandi sagt, at alt tosið um at gera ein miðdepil í Hovi er besta prógvið um, hvussu ósamdar kommunurnar eru.

– Hov er ein neyðloysn sum er skotin upp, tí kommunurnar kunnu ikki semjast um, hvussu oyggin skal byggjast út.

– Vit hava tvey pláss í oynni, sum eru javnt stór. Men tey bæði plássini semjast so illa, at tey eru noydd at gera eina neyðsemju um at gera eitt triðja, kunstugt pláss mitt ímillum og tað vísir bara, hvussu stór ósemjan í veruleikanum er.

## Talaraskeið í Havn

Komandi vikuskifti bjóðar Heimamissiónin øllum ungum og vaksnum til eitt spennandi talaraskeið. Skeiðið er fyri øllum, ið eru eldri enn 16 ár.

Skeiðið er ætlað øllum, sum hava roynt at tala á einum møti, men ikki minst teimum, sum ikki hava roynt hetta áður. Sagt verður, at øll kunnu fáa okkurt gott og viðkomandi burtur úr skeiðnum.

Møguleiki verður eisini at royna hetta við sjálvur at halda eina talu á skeiðnum. Her verður skipað soleiðis fyri, at allir luttakarar fáa ein tíma at fyrireika seg í og síðan bera fram eina royndartalu uppá 10 min í einum bólki upp á 5-6 persónar. Hinir persónarnir fara síðani at geva feedback til taluna.

Tað vera bert føroyskir undirvísarar til skeiðið. Teir eru Hans Kristian Justesen, Sverri Steinhólm, Alfred Olsen, Tom Skaale, Reimund Langgaard, Jógvan Steintún og David Mørkøre.

Sum ein part av skeiðnum verður eisini hugt eftir upptøkum av, hvussu stórir talarar úti í heimi bera fram boðskap sín. Síðani verður ein eftirmeting gjørd av hesum eisini.

**sb.**